Til Landsstýrismálanevndina

Á fundi í Landsstýrismálanevndini tann 13. mars 2008 hevur nevndin heitt á nevndarskrivaran um at gera nevndini eitt tilmæli sambært § 5, stk. 3 í starvsskipanini í sambandi við áheitan frá Johan Dahl, tingmanni, um, at nevndin kannar tey viðurskifti, sum Jacob Vestergaard í fyrispurningi tann 12. mars 2008, sáar iva um, t.e. "viðurskiftini millum landsstýrismannin í fiskivinnumálum og Kongshavnar Útgerðarfelag og disposisjónir í felagnum".

Rættarligu áhugamálini hjá landinum mótvegis Kongshavnar Útgerðarfelag eru ávikavist sum lánsveitari og sum skattavald.

Tað er ikki landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, men landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum røkir landsins áhugamál í sambandi við innheinting av almennari skuld og sum skattavald. Víst verður í hesum sambandi til § 15 í fráboðan nr. 3 frá 18. februar 2008 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar.

Harumframt boðar løgmaður frá í sambandi við fyrispurningin frá Jacob Vestergaard tann 12. mars 2008, at viðgerðin av umsókn um at flyta landskassalán í Napoleon til annað skip er løgd til Fíggjarmálaráðið av viðgera.

Spurningurin um álitið á sitandi landsstýrismann í fiskivinnumálum er ein politiskur spurningur, sum løgmaður ella Løgtingið mugu meta um.

Jacob Vestergaard sáar iva um, hvørt disposisjónir í Kongshavnar Útgerðarfelag hava havt týdning fyri støðuna hjá landinum viðvíkjandi landskassaláninum í Napoleon. Harumframt er alment sáddur ivi um skattligu viðurskiftini í sambandi við hesar disposisjónir.

Av tí, at málið er reist í sambandi við ófráboðaðan fyrispurning í tinginum, fyriliggur einki tilfar, sum nevndin kann nýta at gera eina meting av, hvørt rímilig grund er at halda, at brot er framt á lóggávuna.

Fyri at kunna gera eitt tilmæli sum grundarlag fyri eini meting av, um Fíggjarmálaráðið - við fyrrverandi ella verandi landsstýrismanni - hevur røkt sínar skyldur á fullgóðan hátt, verður mælt til, at Landsstýrismálanevndin biður landsstýrismannin í fíggjarmálum um at upplýsa, hvørji stig Fíggjarmálaráðið hevur tikið fyri at trygga áhugamálini hjá landinum, sum lánveitari og skattamyndugleiki, herundir serliga í sambandi við umrøddu disposisjónir í Kongshavnar Útgerðarfelag.

25. mars 2008

Kristina Samuelsen
nevndarskrivari